# ES ætlar at føra dumpingsak móti føroyskum laksi

**Sambært IntraFish í Noregi fer ES at føra eina dumpingsak móti Chili og Føroyum. Hetta kann føra til, at laksaavtalan millum Noreg og ES verður framlongd eftir 30. september. Hetta kann eisini merkja, at revsitollur verður lagdur á norskan laks**



*Sambært IntraFish ætlar ES at føra eina dumpingsak móti føroyskum og chilenskum laksi. – Tað er gingið upp fyri ES-nevndini, at Noreg er vorðið órættvíst viðfarið, sigur Per Dag Iversen, sum starvast í norsku alivinnuni*

LAKSAVINNAN
*Vilmund Jacobsen*

Talsmenn fyri norsku laksavinnuna vóru herfyri á fundum við ES-nevndina í Noregi. Har fingu norsku umboðini váttað tíðindini um, at ES-nevndin vil fara undir dumping-kanningar móti chilenskari og føroyskari laksavinnu

– Tað er gingið upp fyri ES-nevndini, at Noreg er vorðið órættvíst viðfarið.

Sakirnar móti Chili og Føroyum merkja, at okkara søk og gjøgnumgongdin av norskari laksavinnu møguliga verður seinkað. Hetta kann aftur koma at merkja, at laksaavtalan millum Noreg og ES kann verða framlongd eftir 30. september, sigur projektstjórin, Per Dag Iversen, sum starvast hjá fyritøkuni, FHL, við IntraFish.

### Dumpingsakir loysa einki

Men hvat kunnu so hesar dumping-sakir móti Chili og Føroyum merkja fyri Noreg? spyr IntraFish.

– Vit vænta ikki, at dumpingsakir loysa nakrar sum helst trupulleikar, men vænta heldur, at slík tiltøk skapa nýggjar trupulleikar. Vit hava alla tíðina sagt, at vit halda tað vera skeivt at fremja tiltøk bara ímóti okkum. Men ein kann eisini hugsa sær, at ES-nevndin ynskir, at allir koma undir somu treytir, sum ikki nýtast at vera negativar, men sum kunnu viðføra eina positiva gongd fyri allar. Hetta er eisini ein møguleiki, heldur Per Dag Iversen.

Hann heldur, at tíðin frameftir fer at verða brúkt til umhugsunar og heimaarbeiði fyri partarnar.

– Um nakrar mánaðir fáa vit eina mynd av, hvussu framtíðar laksamarknaðurin fer at síggja út – hvør verður við, og hvørjar treytirnar verða, sigur Iversen.

### Ótryggleiki um prísavtalur

Laksaavtalan millum norskar myndugleikar og ES-myndugleikarnar er nú formelt framlongd frá 30. juni til 30. september. Hvat hendir við prísavtaluni hjá útflytarunum, sum gongur út, er framvegis óvíst.

– Tað eru tvey alternativir. Annað er at seta í verk revsitoll á norskan laks í einari framleinging av avtaluni. Hitt er, at framleingja prísavtaluna. Støða er ikki tikin til, hvat skal henda við prísavtaluni. Spurningurin hevur verið umrøddur – fyri og ímóti, sigur Per Dag Iversen.

### Tóm ES-skrivstova

Maðurin hjá fyritøkuni, FHL í Brússel, Bernt Asbjørnsen, kemur sum upprunaliga ætlað heim til Noregs í august/september. Tað merkir, at FHL ikki longur verður umboðað í Brússel.

– Tað eru eingi tekin um, at Bernt verður loystur av og annar persónur kemur í hansara stað, sigur Per Dag Iversen við IntraFish.

# Veita betri tænastu til feskfiskaflutningin

**– Simone J er størri, betri og siglir nógv skjótari enn Sea Lion, sigur Tórheðin Jensen, sølu-og marknaðarføringsleiðari hjá Skipafelag Føroya, um skipið, sum felagið hevur leigað frá einum týskum felag**

FLUTNINGUR
*Vilmund Jacobsen*



*Simone J var í Saltangará fyrstu ferð týsdagin. Skipið er stívliga 100 metrar langt ogsiglir 15-16 míl.*

*– Við hesum skipinum kunnu vit veita okkara viðskiftafólki eina uppaftur betri tænastu, sigur Tórheðin Jensen, sølu-og marknaðarføringsleiðari hjá Skipafelag Føroya*

*Mynd: Vilmund Jacobsen.*

Skipafelag Føroya hevur leigað eitt stórt og skjóttgangandi bingjuskip, Simone J, til flutningin millum Hirtshals og Føroyar. Simone avloysir Sea Lion, sum hevur siglt hesa rutu fyri felagið í meira enn eitt ár.

Simone, sum eitt týskt felag eigur, fór fyrstu ferð úr Hirtshals síðsta fríggjadag og var á Havnini sunnukvøld.

Mánadag verður skipið lossað í Havn og í Saltangará týsdag. Mikumorgunin er skipið í Klaksvík, og haðani ber leiðin til Hirtshals, har tað er tíðliga fríggjamorgunin.

### Bingjuskip burtur av

Tórheðin Jensen, sølu-og marknaðarføringsleiðari hjá Skipafelag Føroya, sigur, at Simone J er eitt bingjuskip burtur av.

– Í mun til Sea Lion, sum var 88 metrar langur og tók 247 20-fóts bingjur, er Simone stívliga 100 metrar long og tekur 384 20-fóts bingjur. Sea Lion sigldi 12 míl, meðan Simone J siglir 15-16 míl.

Tórheðin vísir á, at skal rutan haldast á vetrardegi, er neyðugt við einum skipi, sum siglir skjótari og er heldur størri enn Sea Lion, og tað ger og er Simone J.

Hann sigur, at Simone er eitt bingjuskip burtur av, og málið við hesum skipinum er fyrst og fremst at veita viðskiftafólki eina betri tænastu.

– Vit hava serliga hugsað um flutningin av feskum laksi og feskum fiski annars, sigur Tórheðin og leggur aftrat, at møguleikarnir við frystum fiski nú eisini eru uppaftur betri.

### Minnir um Pasadenu

Tórheðin sigur, at skal Simone J samanberast við annað skip, sum Skipafelagið hevur havt, minnir tað um Pasadenu, sum felagið leigaði fyri nøkrum árum síðan.

Spurdur, hvussu leingi felagið fer at leiga bingjuskipið, sigur hann, at sáttmáli verður gjørdur um eitt hálvt ár í senn, men møguleikar eru at leiga skipið í langa tíð framyvir.

– Sea Lion var heldur lítil og kláraði ikki so væl at halda rutuna í vánaligum veðri, sigur Tórheðin.

Hann vísir á, at Simone J tekur sonevndu reeferbingjurnar og vanligar bingjur. Einki leyst góð er í skipinum. Alt fer í bingjur.

– Hini bæði skipini, Blikur og Lómur, taka bæði bingjur og leyst góðs, sigur Tórheðin Jensen, sølu- og marknaðarføringsleiðari hjá Skipafelag Føroya.



Kongshavnar barnagarður og vøggustova:

# Elsti barnagarður í Eysturoynni



*Fríða Lómstein hevur verið leiðari á barnagarðinum øll 20 árini hann hevur verið í Saltangará. Um eitt lítið ár flytir barnagarðurin út til Runavíkar*



**Herfyri fylti Kongshavnar barnagarður og vøggustova í Saltangará 20 ár. Barnagarðurin, sum er tann elsti í oynni, stendur nú yvirfyri nýggjum avbjóðingum, tá flutt verður inn í nýggj høli um eitt lítið ár**

BARNAGARÐUR
*Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Finnur Justinussen*

**Runavík:** Sjálvt um barnagarðurin er gamal, so eru avbjóðingarnar altíð nýggjar. Seinastu 20 árini hevur barnagarðurin í Saltangará húsast í kjallaranum á Posthúsinum undir heldur trongum umstøðum. Men um eitt lítið ár flytir barnagarðurin út til Runavíkar, beint við Toftavatn, og tá fara nógvar broytingar fram.

Herfyri fylti barnagarðurin 20 ár, og er hann tí tann elsti í oynni. Ongin barnagarður var aðrastaðni í Eysturoynni áðrenn hesin var settur á stovn. Fríða Lómstein hevur verið leiðari á barnagarðinum øll hesi árini og greiðir hon soleiðis frá:

– Tá barnagarðurin fylti 20, tann 1. mei, høvdu vit bjóðað foreldrum til kaffi og lagkøku. Børnini fingu døgurða, og seinni um dagin fingu tey so eisini køku. Vit valdu ikki at gera so nógv burturúr, tí plássið er so lítið.

### Stórar broytingar

Fríða Lómstein sigur, at stórar broytingar hava verið síðani barnagarðurin fyrst var latin upp og til dagin í dag.

– Tá barnagarðurin fyrst lat upp fyri 20 árum síðani var tað ikki vanligt við stovnum her í oynni, og tí kendu fólk ikki so nógv til hetta. Í dag seta foreldrini nógv størri krøv enn fyrr, tí fleiri av teimum hava roynt aðrar stovnar. Men hetta haldi eg bara vera positivt, tí soleiðis halda tey eisini eitt vakið eyga yvir okkum, og vit sleppa ikki at »sovna« í okkara arbeiði, sigur leiðarin á barnagarðinum.

– Fyrr vóru karmarnir eisini strangari. Børnini sum gingu á teimum ymsu stovunum sluppu ikki at ganga ímillum stovurnar uttan loyvi. Í dag er hetta sambandið opnar. Nú sleppa børnini at renna ímillum stovurnar sum tey vilja.

Av tí, at stovurnar vóru meira sundurskildar fyrr, var yvirgangurin frá vøggustovu til barnagarð eitt sindur størri enn hann er í dag. Soleiðis er ikki í dag.

– At stovurnar standa so tætt saman ger, at yvirgangurin frá vøggustovu til barnagarð er ikki so stórur. Vøggustovubørnini og barnagarðsbørnini ganga og mala hvør um onnur, og tí verða tær nýggju umstøðurnar hjá einum vøggustovubarni ikki so øgiliga nýggjar, sigur Fríða Lómstein.

### Nýggjur barnagarður

Í dag eru 54 børn tilsamans á stovninum. Men í mei 2003, tá vónandi verður flutt út í nýggja barnagarðin, verður pláss fyri 94 børnum, næstan dupult so nógvum.

– At flyta í ein nýggjan barnagarð merkir fyri okkum, at vit fáa betri pláss og umstøður. Til dømis fáa vit eina høll til børnini, og tað hava vit ikki havt fyrr. Vøggustovurnar vera tvær til 14 børn hvør, greiðir Fríða frá.

Plásstrotið hjá barnagarðinum er tó ikki bert inni. Uttanfyri er ikki nógv pláss at taka av, og harumframt er nógvur larmur og so liggur barnagarðurin eisini við tann mest trafikkeraða vegin í kommuni. Men hesin trupulleikin verður loystur tá flutt verður út til Runavíkar, tí tá verða eisini uttandura umstøðurnar betri. Eisini liggur nýggi barnagarðurin í einum vøkrum náttúruøki, og tá verður lag á manni hjá børnunum at vera uttandura, og vera møguleikarnir eisini fleiri.

Sjálv heldur Fríða hetta vera eina spennandi og nýggja avbjóðing, og er ætlanin at reka nýggja barnagarðin á sama hátt sum tann gamla. Tá verður hugsað um, at barnagarður og vøggustova skulu standa tætt uppá hvønn annan.

Í barnagarðinum eru fólk, sum hava arbeitt í fleiri, fleiri ár. Hetta metir leiðarin vera eitt gott tekin.

– At starvsfólk støðast, má vera eitt tekin uppá, at tey trívast. Eisini koma børn aftur at vitja okkum, og taka vit eisini hetta sum eitt gott tekin. Og nú koma tey fyrstu børnini, sum gingu her, sum sjálvi hava fingið børn, í barnagarðin við teirra børnum, so tað er helst eisini eitt tekin uppá, at tey hava havt tað gott, og tað eru vit sjálvsagt glað fyri, sigur Fríða Lómstein at enda.



*Barnagarðurin í Saltangará fylti 20 ár herfyri. Her eru nøkur av børnunum avmyndað á spæliplássinum uttanfyri barnagarðin*